# Góður fiskiskapur vestanfyri

**Útróðrarbátarnir fáa væl av fiski vestanfyri. Í Sørvági lógu teir í vikuni um 200 pund upp á stampin í meðal**

ÚTRÓÐUR
*Edvard Joensen*

**Sørvági:** Teir hava fiskað væl vestanfyri í vetur. Útróðrarbátarnir í Sørvági hava ligið um eini tveyhundrað pund upp á stampin í meðal.

Mikudagurin var góður dagur hjá fleiri av Sørvágsbátunum. Ein avreiddi 7.000 pund, sum hann hevði fingið á 16 stampum. Ein annar fekk 7.000 pund á 28 stampum, og ein triðji hevði 4.500 pund á 15 stampum.

– Hasir eru helst í betra endanum, sigur Vinjard Joensen, sum tekur í móti fiski í Sørvági. Men eg meti, at fiskiskapurin hjá teimum liggur umleið tey tveyhumdrað pundini upp á stampin í meðal soleiðis yvirhøvur, sigur hann.

Hann letur at, at tað tykist vera fiskur allastaðni. Teir seta bæði norðanfyri og sunnanfyri, sigur hann.

Tað er blandað slag, teir fáa, og prísurin er við at koma seg nú, sigur Vinjard Joensen.

Toskaprísurin er í lagi, og hýsan er eisini við at dýrka eitt sindur nú. Hýsa eitt og tvey hevur hampiligan prís, meðan hýsa trý ikki er so væl fyri í so máta.

Vinjard Joensen veit um dømi fyri jól, har ein útróðrarbátur úr Sørvági mátti gjalda fyri at sleppa av við hýsuna.

Talan var gott nokk bara um eini hundrað pund ella so. Men báturin fekk rokning upp á einar hálvtfimtahundrað krónur fyri at senda hesa hýsuna inn á Toftir.

– Tað var sjálvandi nógv betri, at vit bara góvu Zarepta fiskin at gera frikadellur av, helt seljarin ta ferðina.

Tað er líkt til at fiskur er allastaðni. Eisini heilt inni á sjónum fáa bátarnir fisk. Soleiðis á gágguleið, sum tikið verður til.

Summir hava funnið út av, at fiskur eisini er at fáa inni á firðunum, og teir seta eisini línu har. Onkur er so innalaga, at hann setir innan fyri aliringarnar. Men tað gevur ikki somu nøgdirnar, sum úti á sjónum kortini, sigur Vinjard Joensen. Og honum dámar ikki hendan fiskin. Hann metir hann ikki sum søluvøru.

– Eg havi sagt teimum, at eg taki ikki í móti fiski, sum fiskaður er við aliringarnar, sigur Vinjard Joensen, sum rekur fiskamóttøkuna í Sørvági í samstarvi við Fiskamarknað Føroya á Toftum.



*Mikudagin avreiddi Safir úr Sørvági 7.000 pund, sum teir høvdu fingið á 28 stampum*
Mynd: Edvard Joensen

## VIÐMERKINGAR

# Selvstyre for Færøerne

**Afonso Justino Waco**

Færøerne er et landområde, der ligger nord for Skotland, men som politisk hører til Danmark. Forholdet mellem Danmark og Færøerne har tilsyneladende altid været godt. Alligevel er tanken om selvstændighed opstået i den færøske befolkning, og Lagtingets plan for selvstyre viser, hvor alvorligt situationen betragtes.

Af planen for selvstyre fremgår, hvorledes man forestiller sig de forskellige faser, som færingerne vil gennemgå, før de kan opnå selvstændigheden. De vil have bloktilskuddet fra Danmark aftrappet over de kommende år. De vil gradvist overtage nogle områder som undervisning, kirke og senere politi, luftfart og penge- og valutapolitik, der endnu hører til den danske administration. Der skal oprettes en samfundsøkonomisk fond, som færingerne kan trække på, hvis fiskeriet ikke giver indtægter nok. Og så skal færingerne i året 2012 tage stilling til, om de vil have en suveræn stat.

Ideen om selvstændighed er grundlæggende for alle folkeslag. Frihedstanken understreger, at uafhængighed er ethvert menneskes ret; i overensstemmelse med Menneskerettighederne er alle folk berettiget til at bestemme over deres egen skæbne.

Udover den geografiske adskillelse mellem Danmark og Færøerne har færingerne en afvigende kultur, som giver dem en særlig identitet. De fleste færinger, jeg har mødt her i Danmark, siger for eksempel, at de føler sig fremmede i det danske samfund. Ud fra den tankegang kan man let forstå grunden til den stærke nationalistiske følelse.

Men der findes i den danske opinion nogle, som mener, at færingerne kun begyndte at ønske selvstændigheden, efter der blev opdaget olie i det færøske havområde. Uden her at drøfte indholdet i det konkrete udsagn vedrørende Færøerne vil jeg derimod fremføre et lignende tilfælde i forbindelse med sagen om Cabindas enclave, hvor der ironisk nok påstås for at minimere sagens vigtighed, at alle de fordringer om selvbestemmelsesret, som Cabindas folk står for, kun eksisterer, fordi territoriets havområde er fuldt af olie. I virkeligheden kan det påvises, at det netop er angolanerne og de multinationale selskaber, der holder landet som gidsel af denne grund. Men uanset hvad der bliver sagt, kan princippet om folkets rettigheder under ingen omstændighed ændres.

Derfor tror jeg, at Danmark vil kigge på sagen på en positiv måde. Jeg er sikker på, at de vil behandle problemet positivt, for den danske regering har allerede vist opmærksomhed på sagen ved at bevillige færingerne rettigheden til folkeafstemning. Og jeg mener, at det ikke kan være anderledes, for Danmark er jo et demokratisk land og forpligter sig til at behandle alle problemerne i lyset af en respekt for Menneskerettigheder.

I Cabinda enklaven, hvor jeg kommer fra, får den enkelte borger ikke lov til at ytre sin mening om problemet. Hvis Angola var Danmark, ville Cabindas folk også benytte rettigheden til at bestemme over deres egen skæbne. På den måde ville alle de menneskeliv, der nu bliver ofret under krigen, kunne være blevet sparet.

Ifølge de sidste resultater fra folkeafstemningen om Færøernes fremtid blev svaret et »ja«. Men så blev der rejst spørgsmålet om det danske bloktilskud, som skulle stoppes, hvis færingerne vil styre landet selv. Kan dette forstås som et »nej« fra Danmarks side? Kan man sige, at danskerne er misundelige over den færøske olie? Eller vil Danmark bevare styret på den færøske økonomi? Jeg tror hverken på det ene eller det andet. Man kan sagtens sige, at de danske politikere har stor erfaring for at styre landet, og de ved, hvor svært det vil være for et lille nyt land selv at skulle styre økonomien. Jeg tror, at diskussion om, hvem der skal styre økonomien på Færøerne, når det kommer til stykket, handler om en bekymring fra dansk side, som går ud på at ville beskytte den færøske økonomi mod en eventuel økonomisk krise.

Men det er også rigtigt, at »hvis den danske stat tager ansvaret for Færøernes økonomi, vil færingerne aldrig handle økonomisk ansvarligt.«. Alt skal man lære. Og færingerne skal også lære at tage ansvar for deres egen økonomi. For hvordan kan de føle sig selvstændige, hvis de fortsat er økonomisk afhængige af Danmark? Økonomien er den vigtigste del for at få et samfund til at fungere. I de såkaldte tredje lande bliver økonomien ofte styret af tidligere kolonimagter. Hvis man ser nærmere efter, er økonomien dårlig i disse lande. Grunden til, at dette er tilfældet, kan sagtens være, at de pågældende lande ikke kan kontrollere økonomien godt nok selv. Men samtidig ser vi, at der også gives større spillerum for manipulation i de lande, hvor der ikke råder nogen større viden om økonomien. I nogle lande har der været borgerkrige, som opstod af økonomiske konflikter mellem tidligere kolonimagter og disse lande, da de økonomiske interesser tæller højere end menneskeliv. Congo Brazzaville, hvor krigen endnu ikke er afsluttet, er et af de eksempler, som kan nævnes. Jeg synes, at færingerne for retfærdigheds skyld før styre deres egen økonomi.

Det vil være rart, hvis de samfund, som står for de demokratiske værdier, også ville hjælpe de folk, hvis menneskerettigheder bliver overtrådt af nogle udemokratiske lande.



Nýggi Skálaberg:

# Sauna og solarium í Barentshavinum

**Nýggi Skálaberg verður væntandi klárur í mei. Møguleikarnir hjá manningini verða munandi betri enn umborð á gamla Skálaberg**

FISKIFLOTIN
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:**
Nýggi Skálaberg fer at hava sauna og solarium, kondirúm og teldurúm til manningina. Eisini fer hvørt kamar at hava sjónvarp, útvarp og køliskáp.

- Hetta hava vit valt at gera, tí vit ynskja at raðfesta umstøðurnar hjá manningini hægri, sigur Hanus Hansen, stjóri á JFK Trol.

Skálaberg bleiv fyri stuttum sleipaður úr Ukraine, har hann er bygdur, til Kirkenæs í Norra. Har verður so alt installerað í skipið. Og tað seinasta, sum stjórin í JFK Trol hevur frætt úr Norra er, at hann verður útflýggjaður í mei.

- Við at byggja ein nýggjan Skálaberg vil JFK Trol koma eitt stig víðari, sigur Hanus Hansen.

- Um lívi skal verða lagað innan fiskivinnuna, so noyðist ein at gera okkurt fyri at koma víðari. Og vit hava so valt at lata ein nýggjan Skálaberg byggja. Vit hava rætt til at hava tvey skip, og teimum hava vit eisini ætlanir um at halda fram við, greiðir Hanus frá. Men hann sigur eisini, at sum kvoturnar eru í dag, so er ov lítið at fiska hjá tveimum skipum.

- Men so mugu vit royna at skaffa aðrar kvotur, sigur JFK Trol stjórin og vísir samstundis á, at fiskaríið hevur verið gott í seinastuni.

Stjórin í JFK Trol sigur eisini, at framtíðarætlanir eru á borðinum í samband við nýggja Skálaberg.

- Framtíðarætlaninar eru at kunna selja stóran part av veiðuni liðugtgjørt og pakkað í portiónum beinleiðis av skipinum til handlar, sigur Hanus, sum tó samstundis ásannar, at tað er sera ringt at vita, hvussu hesar ætlanir munnu fara at eydnast.

Tað er serliga úrtøkan úr fiskinum, sum ljósið verður sett á. Hanus Hansen, sigur, at roknast kann við hægri krøvum til úrtøkuna í framtíðini, og við útgerðini sum verður umborð á nýggja Skálaberg, er hann sera bjartskygdur. Hóast útgerðin kostar eyka, so væntar hann at vinna tað innaftur.

Talan er um størri last, størri virki, størri oljugoymslu og eisini størri maskin- og frystiorku.

Her nevnir Hanus so eisini møguleikan til at skifta til eitt nú aðrar vinnur ella at fáa meira burtur úr hjávørum.

Skálaberg er umleið 7,5 metrar longri og 2,2 metrar breiðari enn Sundaberg.

Hanus sigur, at støddin dýrkar ikki skipið tað stóra. Skrokkurin kostar undir 30 milliónir, meðan skipið, tá tað er liðugt, fer at kosta millum 150 og 160 milliónir krónur.

46 koyggjupláss verða umborð, og helst verða umleið 40 fólk við nýggja Skálaberg, sum um alt gongur eftir ætlan, verður í flotanum í summar.



*Skálaberg bleiv sleipaður úr Ukraine til Noregs*



*Nýggi Skálaberg verður væntandi liðugur í mei*





